TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Barnaansingin í Tórshavnar kommunu



Á stovninum er ein barnagarðsstova við 20 børnum og fýra starvsfólkum, og frítíðarskúli við 25 børnum og 3 starvsfólkum.

Tórshavnar kommuna søkir vegna:

## Dagstovnin við Botnánna í Kollafirði eftir:

- einum pedagogi at arbeiða 25 tímar um vikuna á frítíðarskúlanum at byrja 1. februar 2006 ella eftir nærri avtalu.
- einum pedagogi at arbeiða 30 tímar um vikuna á barnagarðinum at byrja 1. februar 2006 ella eftir nærri avtalu.
- einum køksfólki at gera millummála til børnini at arbeiða 5 tímar um vikuna at byrja skjótast til ber.

**Setanarviðurskifti**
Pedagogstørvini verða sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.
Starvið sum køksfólk verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Siv Joensen, stovnsleiðara, tlf.421323.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Dagstovninum við Botnánna, Botnavegur, FO-410 Kollafjørður í hendi í seinasta lagi **mánadagin 9. januar 2006**.



Býlingshúsið hevur 3 stovur, har eru tilsamans 52 børn og 11 starvsfólk.

## Býlingshúsið millum Gilja eftir:

- einum pedagogi til barnagarðin at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 1. mars 2006 ella eftir nærri avtalu.
- einum pedagogi til vøggustovuna at arbeiða 40 tímar um vikuna at byrja 1. mars 2006 ella eftir nærri avtalu.
- einum køksfólki at arbeiða 15-20 tímar um vikuna at byrja 2. januar 2006 ella eftir nærri avtalu.

**Setanarviðurskifti**
Pedagogstørvini verða sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.
Starvið sum køksfólk verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Jónu Guttesen, stovnsleiðara, tlf 318372.

**Umsóknir**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Býlingshúsinum millum Gilja, Postboks 3165, FO-110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi
**mánadagin 19. desember 2005 til starvið sum køksfólk og mánadagin 23. januar 2006 til pedagogstørvini**

- leys størv? Hygg á www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Lívbjargari



**Svimjihøllin**
Í høllini starvast 20 fólk. Starvsfólki skal upp til lívbjargararoynd eina ferð um árið. Tey nema sær eisini víðkað skeið í fyrstuhjálp

**Upp og afturlatingar tíðir:**

| | |
|---|---|
| Mánadag: | 06.45 - 09.00 |
| | 15.00 - 20.00 |
| Týsdag: | 06.45 - 09.00 |
| | 15.00 - 20.00 |
| Mikudag: | 06.45 - 09.00 |
| Hósdag: | 06.45 - 09.00 |
| | 15.00 - 20.00 |
| Fríggjadag: | 06.45 - 09.00 |
| | 15.00 - 20.00 |
| Leygardag: | 09.00 - 17.00 |
| Sunnudag: | 08.00 - 10.00 |
| | 14.00 - 17.00 |

www.svimjihollin.fo

Søkt verður eftir einum manni sum lívbjargara til svimjihøllina.

Starvið fevnir umframt arbeiðið sum lívbjargari um at taka eina hond í ymiskt í tí dagliga.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal vera góður svimjari og hava stóru lívbjargararoyndina, annars verður skipað fyri lívbjargararoyndini á staðnum. Heilsuváttan má útvegast.

**Setanarviðurskifti**
Talan er um eitt fulltíðarstarv, ið er skipað í vaktum. Starvið verður sett sum skjótast. Løn sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Hera Olsen, svimjihallarleiðara, tlf. 30 20 72 ella Jákup Simonsen, deildarleiðara á mentamáladeildini tlf. 30 20 10.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunu, postsmogu 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mikudagin 21.desember 2005. Viðmerk "Lívbjargari" á umsóknina.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Tekniskur stjóri til Tórshavnar kommunu



Tekniski stjórin fer at starvast í ráðhúsinum har m.a. borgarstjórin, kommunustjórin, trivnaðarstjórin og miðfyrisitingarstjórin húsast.

**Tekniska deild**
Tekniska deild hevur 12 fólk í arbeiði og heldur til í gamla poshúsbygninginum saman við byggi- og býarskipanardeildini.

Arbeiðsøkið hjá teknisku fyrisitingini er m.a. at viðgera byggimál og umsóknir um útstykkingar, planleggja og projektera umframt at halda við líka kommunala vegakervið og tekniskar veitingar, sum kommunan hevur ábyrgd av.

**Byggi- og býarskipanardeildin**
Á deildini starvast 12 fólk, harav 3 burturav við málsviðgerð av umsóknum um byggiloyvi v.m.

**Kommunala Brennistøðin**
tekur ímóti dagrenovatión og ídnaðarruski og øðrum burturkasti til endurnýtslu, brenning og tyrving.

- leys størv? Hygg á www.torshavn.fo

Tórshavnar kommunu søkir eftir tekniskum stjóra. Tekniski stjórin er ovasti leiðari fyri teknisku fyrisitingini við tilvísing til kommunustjóra og borgarstjóran.

Tekniski stjórin verður limur í leiðslubólkinum hjá kommununi. Í honum eru herumframt borgarstjórin, kommunustjórin, trivnaðarstjórin og miðfyrisitingarstjórin. Tekniski stjórin verður við til at raðfesta uppgávurnar og leggja framtíðar ætlanir hjá kommununi saman við politisku skipanini.

**Arbeiðsuppgávur:**
Høvuðsuppgávan verður at stjórna og samskipa tey øki, ið hoyra til teknisku umsitingina, og hava ábyrgdina av fakligu, umsitingarligu og fíggjarligu stýringini innan hesi øki.

Tekniski stjórin skal samskipa og raðfesta uppgávurnar á økinum og tryggja, at mest møgulig nytta fæst úr tilfeingi kommununnar. Hetta við t.d. at menna fyrisitingina í samsvari við útbúgvingarpolitikkin, sum verður orðaður. Tekniski stjórin skal eisini tryggja, at fyrisitingin hevur eitt gott samskifti við borgaran, viðskiftafólk og landsstovnar.

Næstu starvsfólkini hjá tekniska stjóranum vera býarverkfrøðingurin og býararkitekturin, sum er byggifulltrúi.

Tekniski stjórin er bindilið millum teknisku umsitingina og politisku skipanina og skal ansa eftir, at lógir, reglugerðir og samtyktir verða fylgdar.

**Tórshavnar kommuna roknar við, at umsøkjari**
- Er áhugaður í og hevur møguliga vitan um býarskipanarlig viðurskifti, býarvarðveiting, náttúru- og umhvørvismál og tekniska økið.
- Hevur viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni.
- Gongur á odda, er sjónligur og motiverandi.
- Dugir væl at fyrisita og samskifta, bæði innan- og uttanhýsis.
- Hevur leiðsluroyndir, er málsøkjandi og tekur undir við einum nýmótans leiðslustíli.
- Er jaligur og til reiðar at taka avgerðir.
- Hevur virðing, fatan fyri og vil samstarva við ta politisku skipanina.
- Dugir at málbera seg á føroyskum.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er tænastumannastarv lønt í 38. lønarflokki (treytað av góðkenning fíggjarmálaráðharrans) við tvey ára royndartíð.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Jens Marius Poulsen, kommunustjóra, ella Heðin Mortensen, borgarstjóra, tlf. 302010.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi hósdagin 5. januar 2006 kl. 16.00. Viðmerkið umsóknina "Tekniski stjóri".

i
Sosialurin

HYUNDAI COUPÉ



Árg. 2000 · km. 55.000

**Til sølu fyri 94.000 kr.**

TEL 50 55 50